

*Hotellið í bygdini Laggan. Har var so hugnaligt, at teir fýra ætlaðu at gista har aftur á norðurleið*

Kalifornia. Eg helt, at tann frintligi amerikanarin og fyrikomandi kona hansara vóru vísindafólk. Tey vistu eina ásins rúgvu um ta fornu søguna um Pilatus og kirkjuna. Jú, so langt norður komu rómverjar. Heilt norður til Miðskotlands tóku teir land.

Pontius Pilatus var rómverskur landshøvdingur í Judea frá árinum 26 til 36, og sum øll verðin veit, hevði hann ábyrgdina av, at Jesus Kristus varð krossfestur. Men at hann skuldi vera skoti, ella at hann skuldi vera føddur í Skotlandi er sera ósannlíkt, tí hann varð føddur bara nøkur heilt fá ár eftir, at rómverjar tóku syðra part av Skotlandi, og harafturat krevja bygdir bæði í Týsklandi og Spania heiðurin fyri at hava borið Pontius Pilatus í heim.

Tað 5000 ára gamla tasktræið í kirkjugarðinum í Fortingall er eitt træ við bleytum nálum, havav navnið tasktræ. Træið er ivaleyst tað elsta í Europa. Ið hvussu er veit eingin nakað um nakað eldrið træ. Tað er lágt og kryplað. Hvat annað skal ein so gomul, livandi vøkstur vera! Oldingin eitur "http://en.wikipedia.org/wiki/Fortingall_Yew" \o "Fortingall Yew" Fortingall Yew

Pilatus ella ikki Pilatus. Fortingall er eitt tað vakrasta plássið í Skotlandi. Ein bygd frá forntíð, heilt aftur til rómverjar, sum eftir øllum at døma bygdu staðin. Og her hevur Hjørleif Kúrberg altso ikki verið!

## Í terrorbøli í Glasgow

Vit koyra og koyra. Kilometur eftir kilometur. Vit skulu jú til Írlands eisini. Heilt har suðurvesturi í Skotlandi er ferjuhavnin Stranraer. Hagar skulu vit. Hagar slepst ikki eftir einum degi, so vit gistu nakrar ferðir í Skotlandi. Á vegnum suður eftir, í vestara hálendinum, gistu vit í einari bygd, sum eitur Laggan. Har funnu vit eitt pinkalítið hotell, sum vit hildu var so stak hugnaligt við sera fyrikomandi vertum. Har var so gott at vera, at vit hildu, vit skuldu royna tað aftur á norðurleið. Hotellið eitur The Monadhliath Hotel. Tað var upprunaliga bygt sum hjáhús hjá einari kirkju. Kirkjan frá 19. øld var ongantíð liðug. Hon minti okkum onkusvegna á Múrin í Kirkjubø, ivaleyst tí hon ongantíð varð liðug. Hotellið stendur við møtistaðin við vegirnar A86 og A889. Hetta er ein høvuðsleið til Norðurvesturskotland úr suðri og eystri.

Vit koyra víðari og koma á motorvegin, ið gongur gjøgnum Glasgow. Tað skuldi verið skjótt at komið gjøgnum henda betongstórbýin. Men hvat hendir! Gbs'arin hjá Júst riggar ikki. Vit eru brádliga vilstir og støðga beint har við floghavnina í Glasgow, har, sum terrorbumban brast herfyri. Vit konsultera kortið, sum Eirikur hevur í plastlumma á tangataskuni. Hetta er ógvuliga fløkt. Her standa vit, fýra mans á hvør sínari motorsúkklu og vita einki. Júst roynir at fáa skjútsið hjá sær at rigga aftur. Tað lukkaðist seinni, men áðrenn tað kom floghavnarpolitiið og bað okkum flyta okkum.

Teir gjørdu enntá eitt lítið sirenuýl, so vit skuldu skilja, hvat teir meintu. Allright, samdust vit um. Har í nánd stóðu nakrir politistar. Eg bað Eirik rulla hagar, teir stóðu, og eg gekk aftan á honum. Politistarnir vóru sera hjálpsamir. Teir peikaðu á kortið. Vit heilsaðu og takkaðu og koyrdu við eftir gbs'aranum, sum nú var í lagi aftur. Hann førdi okkum mitt inn í hjartað á Glasgow á ein veldugt vegakervi í fleiri hæddum. Júst hyggur á gbs'aran og gjørdi eitt ógvuliga knappa usnaring. Hinir aftaná. Allir uttan Eirikur. Vit mistu hann úr eygsjón og støðgaðu. Lítið bil seinni kemur hann undan, vinkandi í einum ferðslutrunka.

So vóru vit saman aftur, og komu til Stranraer í øllum góðum. Tað vildi so til, at ferjan, ein hjá Stena Line, fór um tíggju minuttir.

Vit sluppu við og vóru nú á veg til Belfast í Norðurírlandi.



*Scrabster: Vit vildu ynskt, at atløgubryggjan var nógv størri til Norrönu*



*Júst var ikki meira enn komin í land í Scrabster, tá ið súkklan punkteraði*



*Tey fryntligu amerikonsku hjúnini í Fortingall greiða okkum frá bygdarsøguni*